## Dánjal Andreassen:

# Vann á krabb



*- Tá eg gjørdist frískur av krabbameini, vóru eg og mín familja ongantíð í iva um, at her høvdu hægri maktir verið verið við, sigur Dánjal Andreasen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins*

Sosialurin

**Fyri bert tveimum árum síðani lá hann álvarsliga sjúkur av krabbameini í bæði endatarmi og nýrum. Í dag situr Dánjal Andreasen púra frískur sum stjóri á Strandferðsluni. - Fólk skulu eisini sleppa at hoyra um tær góðu upplivingarnar hjá krabbameinssjúklingum, sigur Dánjal Andreasen, sum her sigur sína søgu**

## Samrøða



**Barbara Holm**

"Eg vænti svullurin er illkynjaður"

Orðini hjá læknanum á Landssjúkrahúsinum renna kalt niður eftir rygginum hjá Dánjali Andreassen, stjóra á Strandfaraskipum Landsins.

Hóast hann hevur havt illgruna um, at okkurt er, sum tað ikki skal vera, er tankin um krabbamein ikki komin honum til hugs. Men læknin tykist ikki vera í iva.

Frá eini løtu til aðra er 54 ára gamli Dánjal, sum ongantíð áður